SKURÐDEPIL

LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

# Nýrasteinur/-ar knúsaðir við kikaratøkni

Nýrasteinur/-ar knúsaðir við kikaratøkni, verður gjørd undir fullari doyving. Beint undan skurðviðgerðini verður ein slanga løgd gjøgnum eitt lítið op í húðini inn til nýrað. Undir skurðviðgerðini verður síðani ein størri slanga løgd ístaðin. Steinur/-ar / í nýrakokuni verða síðan tiknir við einum kikara, ella steinur/-ar/ verða knústir og skolaðir burt.




## Fyrireiking til viðgerðina

Tekur tú blóðtynnandi heilivág, annan enn Magnýl og hjartamagnýl, er neyðugt at gevast í eitt ávíst tíðarskeið, áðrenn viðgerðin fer fram. Hetta verður gjørt í samráð við lækna.

### Royking (royking, nøs-og munntubbak)

Royking er vandamikil og ger mótstøðuførið í kroppinum veikari. Royking minkar um møguleikan fyri at sárið grør skjótt aftur.. Fá tær ráðgeving hjá einum ráðgeva, sum kann hjálpa tær at leggja av at roykja.

## Fyrireiking til skurðviðgerð

Fyrireiking til skurðviðgerðina verður gjørd nakrar dagar áðrenn á innskrivingarmiðstøðini 10 E, sum húsast í kjallaranum á Landspítalið við Hringbraut. Tú skalt minnast til at hava heilivágin við, sum tú dagliga tekur.

## Viðtala

Fyrireiking og vegleiðing er umráðandi undan skurðviðgerð. Starvsfólkið á innskrivingarmiðstøðini fær neyðugar upplýsingar til at meta um heilsustøðuna og journalførir tær. Mælt verður til at ein av tínum avvarðandi verður við í innskrivingini. Innskrivingin tekur umleið 3-4 tímar.

## Rannsókn

Blóðroynd, røntgenmynd av lungum og hjartarit, um tørvur er á tí.

## Heilivág og ovurviðkvæmi

Um tú ikki tolir ávísan heilivág ella annað ella hevur ovurviðkvæmi (allergi), mást tú endiliga siga okkum frá.

**Slangan verður løgd á røntgendeildini, sum húsast á 3 hædd, á Landspítalið í Fossvogi.**

- Tú mást ikki eta fasta føði 3 tímar áðrenn slangan verður løgd
- Tú møtir á 13D, sama dag ið skurðviðgerðin verður gjørd
- Viðhvørt verður sissandi heilivágur givin saman við doyviheilivági, tí mæla vit til, at búgvið fólk fylgir tær.

## Føsta

At fasta er ein partur av fyrireiking til skurðviðgerð. Tí er umráðandi, at magasekkurin er tómur áðrenn skurðviðgerðina. Annars er vandi fyri at spýggja undir doyvingini.

- Etið ikki fasta føði seinastu 6 tímarnar undan skurðviðgerðini. Mælt verður til bert at eta ein léttan nátturða kvøldið fyri.
- Klárir drykkir kunnu drekkast i smáum upp til 2 tímar frammanundan. Klárir drykkir eru luktleysir drykkir við ongum feitti og mjólk í, eitt nú vatn og klár fruktsaft (við ongum frukttægrum), te og kaffi. Umráðandi er ikki at roykja ella brúka annað tubbak, ella tyggja tyggigummi seinastu 2 tímarnar undan skurðviðgerðini.
- Narkosulæknin ger av hvat fyri heilivág tú tekur um morgunin sama dag sum skurðviðgerðin fer fram.

Við innlegging á deildina skal tú hava lutir og tilfar til sjálvrøkt og klæði við tær, sum eru løtt at fara í og úr, t.d. venjingarklæði og góðar skógvar.

Tað ber til at nýta fartelefon. Hon skal tó vera ljóðleys og ikki vera øðrum til ampa.

# Viðgerðardagurin

Tú skalt fara í brúsubað um morgunin tann dagin, sum viðgerðin verður gjørd. Nalvin skal verða reinsaður, og naglalakk og andlitssmyrsl skal takast av. Krem, oljur má ikki verða smurt á húðina undan skurðviðgerð. Best er at lata skart og annað virðismikið liggja eftir við hús.

Tú verður biðin um at møta á 13D, sum húsast á 3 hædd á Landsspítalið við Hringbraut, tann dagin sum viðgerðin verður gjørd. Tú skalt minnast til at hava heilivágin við, sum tú dagliga tekur.

Skurðviðgerðin fer fram í fullari doyving. Í fullari doyving svevur tú undir allari skurðviðgerðini uttan at kenna til pínu. Viðgerðin tekur umleið 2-4 tímar. Um ynskt verður ringir skurðlæknin til ein av tínum avvarðandi aftan á skurðviðgerðina.

Aftan á skurðviðgerðina verður tú flutt/ur á eina viðrakningarstovu, har ansað verður eftir tær í nakrar tímar, áðrenn tú verður flutt/ur aftur á deildina.

Vitjanir eru ikki loyvdar á viðrakningarstovuni, men tað ber til hjá tínum avvarðandi at ringja.

## Pína

Pínuheilivágur verður givin eftir tørvi hjá hvørjum sjúklingi sær. Umráðandi er, at tú sigur sjúkrarøktarfrøðinginum frá, hvussu tú ert fyri, so at pínan kann verða viðgjørd so skjótt, sum tørvur er á tí.

Tá ið mett verður um pínu, verður tað mált eftir einum stiga, sum gongur frá 0 til 10.

**Pínustigið VAS**




## Andadráttur

Teir fyrstu tímarnar aftan á viðgerðina fært tú eitt katetur við súrevni í nøsina.

## Landrør

Undir skurðviðgerðini verður eitt landrør (katetur) lagt upp í bløðruna , ið verður tikið úr 1-2 dagar aftan á viðgerðina. Hetta verður gjørt fyri at hava eftirlit við landúrskiljing beint eftir skurðviðgerðina.

## Slangan í nýra

Áðrenn slangan til nýra verður tikin, verður ein røntgenmynd tikin til at kanna renslið frá nýranum. Í einstøkum førum verður sjúklingurin útskrivaður heim við slanguni í eitt ávíst

tíðarskeið. Aftan á at slangan verður tikin burt, verður eitt vatnavvísandi plástur lagt á skurðin, teir fyrstu tímarnar aftaná.

## Føði

Tú verður fastandi og fær vætu í æðr beint eftir skurðviðgerðina. Hevur tú ikki vaml, ført tú vatn at drekka um kvøldið dagin, sum viðgerðin verður gjørd. Umráðandi er at drekka umleið 2 litra av vætu um døgnið teir fyrstu dagarnar. Hetta er gjørt til tess at tað verður lættari fyri nýragrús, sum eftir er í nýranum, at skolast burt.

## Rørsla

Rørsla er umráðandi eftir skurðviðgerðina. Rørsla skundar undir skjótari bata og stuðlar undir vælveru. Rørsla økir um blóðrensli og minkar um vandan fyri blóðtøppi og lungnabruna

Tí er umráðandi at hvíla í minsta lagi ein hálvan tíma undan hvørja máltíð. Tað tekur tíð at styrkna aftur. Best er at byrja í smáum og at røra seg regluliga hvønn dag. Sum frálíður ført tú styrk og orku at røra teg aftur.

## Svøvnlag

Svøvnlagið kann broytast teir fyrstu dagarnar eftir skurðviðgerðina. Orsøkin til tess kann vera pína, ótti, strongd og larmur av øllum tí virksemi, sum er rundanum teg. Umráðandi er at siga frá hvussu tú ert fyri.

## Kenslulig árin

Tað er ikki óvanligt at uppliva kenslulig sveiggj eftir skurðviðgerðina. Tú kanst kenna teg glaða/-n, viðkvæma/-n ella dapra/-n alt í senn. Aftra teg ikki við at biðja um hjálpina, sum tær tørvar, og tosa um støðu tína og kenslur við starvsfólkið á deildini. Tað ber eisini altíð til at fáa viðtalu við ein sálarfrøðing ella við ein kirkjutænara, ið eru knýttir at deildini.

**Áðrenn útskriving fært tú:**

- Kunning og vegleiðing viðvíkjandi heimferð.
- Ávísan fyri blóðtynnandi heilivági, um tørvur er á tí

## Útskriving

Tú verður útskrivað/-ur 2-3 dagar aftaná.

## Telefonnummar

| | |
|---|---|
| Innskrivingarmiðstøðin B3, | 543 2060 |
| Dagdeild 13D er opið alla gerandisdagar frá kl. 07:00 til 22:00 | 543 7480 |
| Seingjardeild 13G | 543 7360 |
| Ambulatorii 11A | 543 7100 |

**Um tú ella ein av tínum avvarðandi hava spurningar, eru tit vælkomin til at ringja.**

Við ynskjum um skjótan og góðan bata.

Starvsfólkið á dagdeildini 13D

Vinaliga hav í huga, at sjúkrahúsið ikki tekur ábyrgd av peningi ella øðrum virðislutum, sum fartelefonum, teldum o.ø., sum sjúklingurin ella avvarðandi hava við sær.

Gevið gætur, at starvsfólk og næmingar á sjúkrahúsinum eru bundin av tagnarskyldu og mugu tí ikki tosa við teg ella onnur um viðurskifti hjá sjúklingum á deildini. Tí biðja vit teg og avvarðandi tíni um ikki at tosa um tað, sum tit kunnu vera vitni til ella hoyra um aðrar sjúklingar á deildini.

Landspitalið er frálærusjúkrahús, og næmingar í sjúkrarøkt fáa ein part av læru sínu í Landspitalinum. Næmingar fylgja við og taka lut í dagligu viðgerðini av sjúklingum og eru altíð undir ábyrgd og vegleiðing av leiðbeinara sínum.

ÚTGEFANDI:
LANDSPÍTALI
SKURÐLÆKNINGASVIÐ
OKT. 2014

ÁBYRGÐARMENN:
YFIRLÆKNIR ÞVAGFÆRASKURÐLÆKNINGA
OG DEILDARSTJÓRI 13G

ÞÝÐING:
MAJBRITT VESTERGAARD
HÖNNUN:
KYNNINGARMÁL LSH/ÁJC